Hanna Jensen
løgtingsmaður

Nr. 39/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um Gøtudalstunnil settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu gongur við at fyrireika verkætlanina Gøtudalstunnil?
2. Hvussu nógvur peningur verður settur av til endamálið fyri fíggjarárini 2020-2024.
3. Nær væntar landsstýrismaðurin, at koyrandi verður gjøgnum Gøtudalstunnilin?

Viðmerking:
Undanfarna samgonga setti í fíggjarlógini fyri 2019 tvær mió. av til at fyrireika tunnil úr Gøtudali til Skálabotn fyri at leiða ferðsluna úr økinum norðanfyri Gøtueiði um Skálabotn og eftir vestara armi á Skálafjørðinum til Eysturoyartunnilin.

Nú árið veruliga er farið at halla, er áhugavert at kenna støðulýsingina av verkætlanini "Gøtudalstunnil" – ikki minst, tí dagurin nærkast, til koyrandi verður gjøgnum Eysturoyartunnilin, og vestari armur verður upplagda alternativið til alla ferðslu úr økinum og til økið norðanfyri Gøtueiði, og kemur harvið at lætta munandi um ferðslusundurbýtið í Eysturoy.

Ein annar fyrimunur við Eysturoyartunlinum er, at hann bindur landið betri saman – eitt nú økið norðanfyri Gøtueiði, Norðureysturoy, Norðurstreymoy og vesturøkið, har m.a. flogvøllur Føroya liggur. Farleiðin fer at bøta munandi um allan flutning, ikki minst vinnuflutning, sum í dag skal koyra um Gøtueiði, sum vegatekniskt á fleiri støðum hevur eitt hall, sum er størri enn tilmælt, eins og vegurin liggur høgt. Hetta er mangan ein meinbogi, t.d í hálku.

Nú tað eydnaðist undanfarnu samgongu at seta verkætlanina á breddan, og tí fleiri røddir hava umrøtt tann týdning og ta nyttu, Gøtudalstunnilin fer at hava, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 30. desember 2019

Hanna Jensen